





# Góður hýrur

**Døgurða til 450 fólk og opið hús í allari bygdini. Blíðskapurin var óførur, tá fjórða Útoyggjastevnan varð hildin út í Svínoy leygardagin**

ÚTOYGGJASTEVNA

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*
*Myndir: Bárður Lydersen*

Veðrið var gott og hýrurin á fólki av tí allarbesta á Útoyggjastevnuni, sum varð hildin úti í Svínoy leygardagin. Longu kvøldið fyri hevði Másin flutt eini 200 fólk út til Svínoyar, og leygarmorgunin løgdust fleiri skjóttgangandi bátar afturat at flyta stevnugestir til oynna. Út við 600 fólk til samans mundu hava verið á hesi fjórðu Útoyggjastevnuni, tá avtornaði.

## Gestablídni og aðalfundur

Tað sá eitt sindur illfýsið út í veðrinum ta einu løtuna umborð á Másanum hendan morgunin á veg út til Svínoyar, so onkur byrjaði at ivast í, hvussu stevnan mundi fara at eydnast.

- Veðrið fáa svínoyingar neyvan gjørt nakað við, men teir fara í øllum førum ikki at lata tykkum ganga svong harúti, helt ein av manningini fyri. Svínoyingar eru jú tiltiknir gestablíðir, og vit fingu skjótt sjón fyri søgn. Komin niðan móti húsunum Yviri í Stovu, rendu vit okkum alt fyri eitt í fleiri vældekkaði morgunmatarborð í túninum við kaffi, te, bollum og køkum, og tað var bara at fáa sær. Og kendist tað eitt sindur kølið onkra løtu, vóru gestirnir vælkomnir inn í køkin, har matmøðurnar fegnar góvu sær tíð til eitt prát, hóast tær høvdu úr at gera við at smyrja meir bollar og gera kaffi.

Út á fyrrapartin byrjaði so aðalfundurin hjá útoyggjafelagnum, sum er fastur táttur á árligu Útoyggjastevnuni. Formaðurin í felagnum, Óli Jakup úr Dímum greiddi frá árinum, ið fór, og samskiparin Olga Biskopstø legði fram ymsar ætlanir, felagið arbeiðir við í løtuni. Eftir nevndarvalið nýttu fleiri høvið at gera viðmerkingar og siga sína hugsan, og skjótt kom ferð á eitt rættiliga lívligt kjak um støðuna á útoyggjunum og útoyggjapolitikk yvirhøvur. So hóast hetta økið ikki kann sigast at standa ovast á dagsskránni hjá politikarum, var tað týðiligt, at útoyggjafólk sanniliga ikki hava sett seg hendur í favn. Nógvar sera forvitnisligar verkætlanir eru í umbúna, og eftir áræðinum hjá útoyggjafólki at døma, koma vit uttan iva at hoyra meir um hesar ætlanir í nærmastu framtíð.

## Árantshola og kórsangur

Skjótt angaði av góðum døgurða niðri við lærarahúsið, og tað gekk íkki lang tíð, til bíðirøðin av stevnugestum rakk næstan oman í Tún. Og hetta var sanniliga eisini vert at bíða eftir, tí komin framat stóru grýtunum í kjallaranum, har fryntligu kokkarnir oystu uppí, stóðu vit næstu løtu við einum rimmars tallkerki av væl kryddaðum grýturætti við oksakjøti og rísi. Sólin kagaði fram hesa løtuna, so bøurin uttanfyri lærarahúsið gjørdist skjótt ein forkunnug og frísklig matstova við framúr góðum útsýni. Sum vit skiltu, var hjálp komin úr Fugloy at gera døgurða, og tað mundi







